Tit ringja — vit skriva
Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!

tíðindablaðið **sosialurin**

Lýsingar:
Lýsingarmaður okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingaspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran.

Føroyingar sóu danir tapa í beinleiðis sjónvarpi um sovjettiskan fylgisvein

Tað man helst hava verið ein ynskidreymur hjá teimum mongu fótbóltshugaðu føroyingunum at síggja fótbóltsdystin millum Spania og Danmark sunnukvøldið beinleiðis í sjónvarpi Ð heldur enn bert at hoyra hann í útvarpinum.

Fyri nøkur havnarfólk gjørdist hesin dreymur veruleiki. Við hjálp frá einum sovjettiskum fylgisveini var gjørligt at síggja semifinaludystin beinleiðis í sjónvarpi í Føroyum.

Hans Jákup Michelsen, sum er umboð fyri Stornoradiotelefonir í Føroyum og selir Blaupunkt-sjónvarp, hevur í fritíð síni m.a. fingist við at kanna, hvørjir møguleikar eru at fáa sjónvarp aðrastaðni frá um fylgisvein.

Ein av teimum fylgisvenum, sum til ber at fáa samband við úr Føroyum, er ein sovjettiskur fylgisveinur, sum varð uppsendur í 1979 undir navninum GHORSONT 4.

Við eini íløgu uppá umleið 22.000 kr. til GHz-móttakaraútgerð og eina parabol-antennu uppá 1,2 metrar í diametur, ber til at síggja tvey sovjettisk programmir.

Sovjettiski fylgisveinurin er á 13,5 stigum vestur og hevur legu omanfyri ekvator umleið 34.000 kilometrar frá jørðini.

Sunnukvøldið var so semifinaludysturin í fótbólti leiktur í Fraklandi og vísti tað seg, at russar høvdu beinleiðis sending higani um fylgisveinin. Dysturin fekst eisini niður til sjónvarpsantennuna hjá Hans Jákup Michelsen, Handan á 6 í Havn og høvdu fleiri fótbóltsáhugaðir høvi at síggja dystin. Skrúvað var niður fyri sovjettisku taluni og upp fyri danska útvarpinum, soleiðis at bæði ljóð og mynd vóru beinleiðis.

Vit hava spurt Hans Jákup Michelsen, um eisini finaludysturin verður at síggja í sovjettisku sjónvarpi mikukvøldið. Hann sigur seg ikki vita tað, men roknar við tí. Um so er, so er møguleiki at vísa dystin millum Spania og Frakland í framsýningarvindeyganum, Handan Á 6.



Parabolantennan er 1,2 metrar í diametur, so hon er ikki millum tær heilt stórų. Avgerandi er, at festa hana væl

Fer tú at geva fólki møguleikan at síggja dystin?

— Tað er ilt at siga nú, men tað er ikki óvist.

jan



Parabolantennan á húsinum hjá Hans Jákup Michelsen í Havn, sum kann taka sendingar frá sovjettiskum fylgisveini



Eisini sviar siggja sovjettiskt sjónvarp